**MENTAMÁLARÁÐIÐ**

## Stuðul til mentanarlig tiltøk

Sambært Løgtingslóg nr. 60 frá 17.05.2005 er peningur settur av á løgtingsfíggjarlógini til stuðul til tiltøk og verkætlanir innan mentan og list.

Stuðulin verður játtaður sum verkætlanarstuðul ella annar stuðul til einstaklingar, bólkar ella feløg.

Játtanin er kr. 900.000.

**Freistin at søkja er 23. mars 2015**

## Stuðul til myndlistafólk

Peningur er settur av á løgtingsfíggjarlógini til stuðul til myndlistafólk. Listafólk, sum eru undir útbúgving, kunnu søkja. Yrkislistafólk kunnu søkja um stuðul til eftirútbúgving og til námsferðir.

Tá stuðul verður játtaður, verður raðfest í fyrstu atløgu at veita yrkislistafólkum stuðul og í aðru atløgu umsøkjarum, ið eru á eini listarligari yrkisleið.

Játtanin er kr. 100.000.

**Freistin at søkja er 23. mars 2015**

## Stuðul til barna- og ungdómsarbeiði

Tann upphædd, ið Mentamálaráðið umvegis sp/f Ítróttarvedding fær burtur av veddingar-pengunum, verður nýtt sum stuðul til verkætlanir og tiltøk til gagns fyri børn og ung.

Tey, ið skipa fyri tiltøkum og standa fyri verkætlanum, sum eru børnum ella ungum til gagns, eru vælkomin at søkja.

Játtanin, sum er 15% av veddingarpengunum, verður kunngjørd í mai. Í 2014 var upphæddin 1.759.000.

**Freistin at søkja er 15. apríl 2015**

*GG! Umsóknir um stuðul til fløgu- og bókaútgávu skulu sendast til Mentanargrunn Landsins.*

---

Allar umsóknir eiga at verða skrivaðar á serstakt umsóknarblað til endamálið. Umsóknarbløð og vegleiðingar eru at finna á heimasíðu okkara: *www.mmr.fo* ella kunnu fáast við at venda sær til:


**Mentamálaráðið**
**Postrúm 3279 - 110 Tórshavn**
**Telefon 30 65 00 – Telefax 30 65 55**
**e-postur.: mmr@mmr.fo**